# 2500 fólk til møtini

**Í seinastu viku var hildin árliga missiónsvikan í Meinigheitshúsinum í Havn. Nógv fólk komu saman allar dagarnar**

SAMKOMUR

*Snorri Brend*

Møtini byrjaðu næstseinasta sunnudag og endaðu sunnudagin bæði stórum familjumøti og møtum aftur um kvøldið.

Vanliga eru nógv fólk til hesi møtini, og í ár var einki undantak í so máta. Mett verður, at íalt hava eini 2.500 fólk verið í Meinigheitshúsinum hesar dagarnar.

Møtini vóru um kvøldarnar, og eftir at høvuðsmøtið var liðugt, vóru fólk boðin út í heimini. Har varð síðani hildið fram við sangi og vitnisburði.

Til hesi møtini í ár var Heri Elttør, trúboðari úr Aulum í Danmark boðin sum høvuðstalari. Hann virkar vanliga sum trúboðari millum føroyingar í Danmark, men var hesa vikuna boðin higar at tala til føroyingar í Føroyum. Hann fór aftur til Danmarkar í gjár.

Hesar missiónsvikurnar halda fram kring alt landið gjøgnum veturin. Í hesi vikuni verða møtini hildin í Kollafirði og í Fuglafirði.

# Tunnillin skal føra virksemið til okkum

- Tað er neyðugt hjá okkum at fyrireika okkum til teir nýggju møguleikarnar í samferðsluni. Vit ynskja ikki, at ferðslan og virksemið bara skulu koyra framvið hjá okkum, sigur borgarstjórin í Runavíkar kommunu

SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*

*snorri@sosialurin.fo*

Í eina tíð hevur ein arbeiðsbólkur arbeitt við at lýsa, hvussu ein kann útbyggja samferðsluna millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy í framtíðini.

Hetta arbeiðið er komið rætttiliga væl áleiðis, og tí er væntað at eitt álit í hesum máli verður lagt fram seinni í vár. Álitið skal m.a. vísa, um talan verður um ein tunnil av vestara armi av fjørðinum, ella um tann eystari armurin eisini verður tikin við í hesa stóru ætlanina.

Tann stóri spurningurin er eisini, um tað er fíggjarliga forsvarligt at fara undir enn eitt tunnilssamband í Føroyum.

Ein teirra, sum hevur fylgt væl við í hesum arbeiðinum er Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu.

Fyri hann er eingin ivi um, at hesin ætlaði tunnilin til Suðurstreymoy, saman við Norðoyatunlinum, kemur at hava sera stóran týdning fyri ta stóru kommununa, sum hann stendur á odda fyri.

– Um tann seinni tunnilin gerst veruleiki, so fer tað eisini at seta stór krøv til okkum. Ein stór uppgáva hjá okkum verður tá, at fáa bæði ferðslu og virksemi til okkara, sigur hann.

## Skal gagna fólkinum

Fyri borgastjóran í Runavíkar kommunu eru Eysturoyggin og Norðoyggjar at meta sum tveir deplar í samfelagnum, og sum tí mugu samstarva.

– Her hava vit tvey týðandi økir, sum ikki eiga at draga sundur, men heldur at standa saman ímóti t.d. fólkavøkstrinum í Suðurstreymoy, sigur hann.

Lítil ivi er um, at tunnilin til Klaksvíkar kemur at hava sera stóran týdning á mong viðurskifti í kommununi. Og skal tunnilin koma at gagna fólkinum har, er neyðugt at tey standa saman, so at alt virksemið ikki bara fer koyrandi framvið.

Í Runavíkar kommunu hevur ein tí tosað nógv um, hvussu ein skal fyrihalda seg til tær nýggju avbjóðingarnar í samferðsluni, og hvat ein ítøkiligt skal gera, so ein fær sum mest burturúr hesum sambandinum.

Eisini vinnulívið og handilslívið duga at síggja teir nýggju møguleikarnar, sum fyrst ein tunnil – og seinni helst tveir tunlar – fara at geva í Runavík. Og her ætlar ein sær ikki bara at sita hendur í favn.

– Fyri mær at síggja hevur samfelagið brúk fyri bæði Runavík og Klaksvík. Tí er okkara vón, at báðir deplarnir fara at fáa nógv burtur úr í framtíðini, sigur Rodmundur.

Hesir nýggju møguleikarnir í samferðsluni fara eisini at gera tað uppaftur lættari hjá fólki at ferðast millum heimið og arbeiðsplássið. Tí er ikki óhugsandi, at nýggj arbeiðspláss kunnu verða skapt á báðum støðum.

## Fjørðin sum eina eind

Sum nevnt fer arbeiðsbólkurin at leggja fram álitið um sambandið við Suðurstreymoy um ikki so langa tíð.

Borgarstjórin í Runavík sigur, at fyri hann fer eitt slíkt samband, um tað gerst veruleiki, ikki bert at fáa týdning fyri viðurskiftini millum Eysturoynna og Suðurstreymoy.

Hetta fer eisini at skapa øllum bygdunum fram við Skálafjørðinum nýggjar møguleikar og avbjóðingar í framtíðini.

Her finst longu nú eitt ótrúliga stórt virksemi innan mong øki. Tí hevur hetta økið sera stóran týdning fyri landsbúskapin, og við hesum sambandinum verða eisini sparingar við styttri farleiðini.

Og júst hetta er eisini ein partur av hugsanini hjá Rodmundi Nielsen um at binda Skálafjørðin enn sterkari saman, so hann kann gerast til eina sterkari eind.

– Jú, vit gleða okkum at frætta nærri frá arbeiðsbólkinum um fasta sambandið til Streymoynna, sigur hann.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 5, 2005
www.kaupthing.fo

# Áhugaverd vika fyri framman

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku komu fleiri áhugaverd lyklatøl. Búskaparligi vøksturin í USA í 4. ársfjórðingi gjørdist 3,1%, tað var nakað lægri enn væntað. Sum heild royndist 2004 tó væl í USA, búskapurin vaks 4,4% í mun til 2003. Í Evropa varð týskt vinnuálit eitt vet hægri í desembur enn væntað. Tað er tó vónirnar til framtíðina, ið hála vísutalið upp, metingin av núverandi støðuni varð verri enn mánaðin fyri. Úr Týsklandi komu eisini tøl fyri prísvøksturin í nøkrum landspørtum, og tey vístu lægri prísvøkstur enn væntað, um 1,5%.

Hesa vikuna kemur ein yvirflóð av áhugaverdum lyklatølum. Úr Evropa koma tøl fyri vinnu- og brúkaraálit, prísvøkstur umframt, at evropiski miðbankin, ECB, hevur rentufund. Úr USA kemur vinnuálit, tjóðbankin, FED, hevur rentufund, og fríggjadagin verður týdningarmesta hendingin higartil í ár, tá arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin kemur.

Í USA vænta fíggjarmarknaðirnir, at FED fer at hækka rentuna 0,25% til 2,50%, eins og tey hava gjørt á hvørjum fundi síðan juni í fjør. Í Evropa vænta fíggjarmarknaðirnir, at ECB eisini fer at lata rentuna vera óbroytta á 2,00%, eins og tey hava gjørt síðan mai mánaða í 2003. Tá tað vera so nógvar týðandi hendingar í vikuni, kann rættilig røring koma í marknaðirnar. Tó kunnu nógvir íleggjarar fara at halda seg í frið til arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin kemur.

Í farnu viku vóru fleiri góðir roknskapir kunngjørdir, ma. Microsoft sum ávirkaði partabrøvini jaligt. Serliga tann norrøni marknaðurin stóð seg væl. Nokia kunngjørdi ein betri roknskap enn væntað. Hóast úrslitið var minkað er teirra marknaðarpartur vaksin og leiðslan metti útlitini fyri 2005 verða bjørt. Heilivágsfyritøkan Novo Nordisk kunngjørdi somuleiðis sín roknskap sum gjørdist betri enn væntað.

Valið í Irak, í vikuskiftinum spældi væl av uttan ov nógvar yvirgangsatsóknir, og saman við útitinum fyri einum líggjari summari í USA, fekk tað oljuprísin at lækka. Hetta fekk partabrøv at hækka mánadagin.

Hesa vikuna kunngerða Boeing, Gillette og Devon Energy sínar roknskapir sum saman við umrøddu arbeiðamarknaðarfrágreiði ngini kunnu ávirka gongdina á partabrøvum hesa vikuna.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,44% | 0,01% |
| 5 ára lánsbræv | 2,99% | 0,02% |
| 10 ára lánsbræv | 3,68% | 0,00% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 291,8 | 2,3% |
| OMX, Svøríki | 744,3 | 2,3% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.980,0 | 1,4% |
| S&P 500, USA | 1.171,4 | 0,3% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,99 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 172,21 | -0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 85,38 | -1,5% |
| Altjóða Vøkstur | 59,93 | 0,1% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,73 | 0,5% |
| EUR | 7,44 | 0,0% |
| GBP | 10,78 | 0,6% |
| NOK | 0,90 | -0,5% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*